# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21.09.2023 |
| Mál nr.: | 23/18950 |
| Málsviðgjørt: | JS |
| Ummælistíð: | 25.09.2023-23.10.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## at rokna inntøkugrundarlag og nettoskuld sambært kommunustýrislógini

Við heimild í § 43, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin) sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22 mai 2023, verður ásett:

**§ 1.** Inntøkugrundarlagið hjá kommununi, sum verður nýtt til at áseta skuldarmark, fevnir um hesar inntøkur:

1) Persónsskattur
2) Skattur av eftirløn sbrt. løgtingslóg um eftirløn
*3)* Endurgjald sbrt. løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir

*Stk. 2.* Persónsskatturin verður roknaður við einum útrokningarskattaprosenti á 23% uttan mun til kommunuskattaprosentið í tí einstøku kommununi.

**§ 2.** Nettoskuldin hjá kommununi verður uppgjørd sum langfreistað skuld og stuttfreistað skuld frádrigið umsetiliga ogn.
*Stk. 2.* Umsetilig ogn er ogn, sum ikki er støðisogn, t.d. tøkur peningur, goymslur og áogn.
*Stk. 3.* Støðisogn er standardkonta 01 og 02 í kontoskipan landsins.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer kunngerð nr. 12 frá 11. februar 2003 um útrokningarskattaprosent sambært kommunustýrislógini úr gildi.

Fíggjarmálaráðið, dd. oktober 2023

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason